

Las Vegas á nýggjárinum

á ísskoytum. Her kom ein ordiliga í jólahýr av øllum teimum glaðu fólkunum og øllum jólastásinum, sum var har. Her stendur millum annað eitt stórt jólatræ, sum er kent um allan heim – serliga frá teimum amerikonsku filmunum. Eftir skoytingina fóru vit í bygningin The Rock sum liggur í Rockefeller Center. Á toppinum á The Rock høvdu vit gott útsýni yvir alt Manhattan. Sum flestu føroyingar, so dámar okkum væl at fáa dunnu jólaaftan, so vit leitaðu okkum til eina kinesiska matstovu, har vit fingu eina dunnu. Hetta var hugnaligt, tí uppá aðrar mátar líktist hetta ikki teimum vanligu jólunum, har ein fær rís ala mande, gávur og annað. So man kann siga, at dunnan kom væl við.

Dagin eftir fór tað mesta av degnum til at vitja tað kenda Central Park. Av tí at hon er vorðin nýtt í fleiri filmum og sjónvarpsrøðum, ger tað hana óivað til tí mest kendu parkina í heiminum. Parkin hevur millum annað nógv manngjørd vøtn, langar gangibreytir, tvær skoytubreytir og nógvar minnisvarðar, millum annað Strawberry Fields, sum er víga John Lennon. So ein kann ikki annað enn at hugna sær har, og vit vóru har ein heilan dag.

Á tí seinasta heila degnum í New York City vóru vit á nógvum støðum. Nú skuldi alt náast, áðrenn vit máttu víðari. Vit byrjaðu dagin við at fara til støð sum t.d. ST-bygningin, Chrysler bygningin og býarpartarnar Little Italy og Chinatown. Eftir hetta avgjørdu vit at ganga yvirum Manhattan Bridge og heim aftur eftir Brooklyn Bridge. Seint um kvøldi fóru vit so inn í kenda Empire State Building, sum er hægsti bygningur í New York City.

Av tí at vit búðu í sentrum í Manhattan, so gingu vit okkara dagligu gongd í Fifth Avenue, har m.a. Times Square liggur. Tá ið man kemur til Times Square, so verður ein fullkomiliga kringsettur av lýsingum og jólaprýði. Her eru lýsingar lagdar útyvir allar teir stóru bygningarnir.

Um vit taka samanum jóladagarnar í New York City, so føldu vit eitt øgiligt jólares, sum ikki er nærhendis tað føroyska. Her livdu amerikanarnir veruliga upp til sítt umdømið at vera stórslignir um jólahøgtíðina. Tað var øgiligt lív á gøtuni, har fólk royndu at fáa tær síðstu gávurnar uppá pláss. N var gjørt fyri at halda býin jólaligan, bæði við jólapynti og jólamonnum.

Ávegis til New York City fingu vit fleiri ferðir at vita frá fólki og høvdu eisini tann fordómin frá filmum, at New York var ein kriminellur býur og ein skuldi ansa eftir, hvønn ein tosaði við. Men tá ið vit komu til býin, tosaðu vit við ein lokalan á okkara aldri. Hann segði, at vit høvdu onki at vera bangnir fyri um vit brúktu okkara vit og skil og uppførdu okkum nøkulunda. Hann legði aftrat, at tað er satt, at býurin ikki altíð hevur verið tann fínasti at ferðast í. Men fyri nøkrum árum síðani byrjaðu tey at rudda upp á gøtunum fyri skøkjulevnaði og tílikum, og nú stendur tað væl til og fólk í býnum eru vorðin meir opin. Vit kunnu ikki annað siga, at tað er satt. Vit høvdu ongantíð nakran trupulleika við nøkrum, og tá vit spurdu um veg, so vóru tey skjót at hjálpa til.

Dagin eftir løgdu vit so leiðina til Las Vegas. Vit fingu eitt hotelrúm mitt á The Strip, har allar høvuðsatraktiónirnar eru. Vit fóru til Las Vegas fyri at halda nýggjár. Her eru nógv ferðandi allastaðni frá, so tað er lætt at koma í samband við onkran, tí tey eru eisini komin at njóta henda býin, sum hevur nógv spennandi at bjóða. Dagarnir upp til nýggjársaftan fóru mest til at njóta nøkur tiltøk, sum vóru har og eisini royndu vit eydnuna á pokerborðinum. Nýggjársaftan var stórt hald á The Strip, høvuðsgøtuni, har tað byrjaði við einum Evil Knievel-sýning, har ein skuldi gera eitt størri lop við síni motorsúkklu. Áðrenn hann gjørdi hetta lop sóu vit á øllum skermunum, at tað varð nýggjár í New York. Hetta show'ið við motorsúkkluni var víst beinleiðis á sjónvarpsrásum í øllum USA. Tá tað nærkaðist nýggjár funnu vit saman við tveimum skotum á sama aldri, sum vit síðani hildu gamlaárskvøld saman við. Sjálvt nýggjársskiftið bleiv tað ikki skotið fýrverkarí, sum man ger í Føroyum, har øll skjóta eitt sindur í part. Her vóru tað hotellini í hvør sínum lagi skutu tað heilt stóra fýrverki.

Um man skal taka samanum so halda vit at Las Vegas nýtist ikki at verða so dýrt. Hetta er ein býur fyri øll. Hóast tey eru heimskend, so eru hotellini á The Strip ikki so dýr at búgva í, t.d. er tað nógvar ferðir verri at finna innivist í Manhattan fyri ein bíligan penga. Men eisini má sigast, at Las Vegas kann lúka øllum tørvum hjá ríkmonnum, sum ofta leggja leiðina her til. Men tak ikki feil. Um man vil til øll tiltøkini og kanska royna okkurt á casinounum, so kann tað lættligani gerast dýrt. Men í New York kostar alt.

Í morgin leggja vit leiðina víðari frá Las Vegas, har næsta ferðamál okkara verður Hoover Dam og Grand Canyon.

Leggjast kann aftrat at at vit hava gjørt ein profil til endamál, hann er á www.myspace.com/hanusogatli



Niagara Falls

# Kanska til Føroya



Brian Tawney og Jill Saltzman

Eftir at vit løgdu leiðina frá Chicago, ótu vit í einum staði beint uttanfyri Akron, sum er í Norðureystur Ohio. Her komu vit í prát við eini hjún, sum búðu tætt við. Orsøkin at vit komu í samband við tey var, tí at tey vóru forvitin at vita hvar vit vóru frá. Tey hildu at okkara mál líktist eitt sindur tað týska, men vistu at hetta ikki var týskt, so tey máttu spyrja .

Teirra nøvn eru Brian Tawney og Jill Saltzman. Brian er 39 ára gamal og er "test engineer fyri eitt medical imaging virki ". Jill er 41 ára gomul og er "paramedic working on a mobile intensive care unit" og hevur havt hetta arbeiðið í 10 ár.

Vit komu í prát um hvussu tey fóru at halda heilidagarnar um jólahøgtíðina. Tey søgdu at teirra ætlan var at halda tey saman við familjuni hjá Brian, har tey m.a. hava eina stóra máltíð, líknandi tí sum man sær í sjónvarpinum. Eftir hetta ætla tey at fara til St. Pete Beach í Florida, har Brian skal taka lut í "the Aikido Winter Intensive Training" . Aikido er ein japansk martial art líknandi tí sum man sær Steven Segal gera í filmum. Brian hevur gingið til Aikido í næstan 20 ár. Nýggjárshaldið verður hildið saman hinum luttakranum í "the Aikido Winter Intensive Training", har tað verða umleið 100 fólk samlaði, so tað gleða tey seg nógv til.

Tá vit í eina góða løtu bert høvdu tosað við tey um jólini hjá teimum, byrjaðu tey at fregnast um Føroyar. Vit greiddu teimum frá um oyggjar okkara og vístu teimum myndir. Tey vístu stóran áhuga fyri Føroyum og høvdu gott hugsað sær einaferð at ferðast har.Vit hava havt samband við tey aftur og møguligani ein túrur til Føroyar einaferð verður veruleiki hjá teimum.